# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:**
**www.sosialurin.fo**

# Dómaratrot noyðir FSF at broyta FIFA prinsipp

*Orsakað av dómaratrotið, er FSF noytt at bróta tær av FIFA fyriskrivaðu reglur um, at FIFA skrásettir hjálpardómarar ikki kunnu døma í fremstu heimligu deildini*

JÁKUP MØRK

Síðani summarsteðgin hevur Tummas Pauli Olsen, sum annars hevur verið hjálpardómari, eisini dømt dystir í bestu føroysku mansdeildini.

Hetta í sjálvum sær er kanska ikki so merkisvert, og yvirhøvur tykist hann eisini at vera komin væl frá uppgávu síni í so máta.

### Í stríð við FIFA reglur

Trupulleikin við hesum er, at hetta er beint í stríð við tær reglur, sum altjóða fótbóltssamgongan, FIFA, hevur viðtikið á økinum.

FIFA setir nevnliga sum treyt, at ein hjálpardómari í FIFA-høpi ikki kann døma dystir í fremstu heimligu deildini. Hetta hevur áður ført til skarpskeringar heima í Føroyum, men nú noyðir dómaratrotið FSF at seta hesa lóg til viks.

Óli Holm, formaður í dómaranevnd FSF's sigur við Sosialin, at orsøkin til, at FSF nú víkir frá teimum reglum, sum FIFA hevur stungið út í kortið, er sjálvsagt, at tað í løtuni er veruligt trot á dómarum. Hann sigur, at talan sum so ikki er um nakað krav frá FIFA, men viðgongur tó, at FSF áður hevur hildið fast um hesar reglur, sum eisini verða nýttar í øllum grannalondum okkara.

Hann heldur ikki, at talan sum so er um nakra nýggja støðu, men at hetta er vorðið serliga týðuligt, nú tríggir royndir dómarar innan stutta tíð hava lagt frá sær.

Talan er um Oddmar Andreasen og Birgir Sondum, sum báðir kendu seg illa viðfarnar, umfram at Kim Ejdesgaard í summar legði floytuna endaligt á hillina, eftir at hava dømt í fremstu deildini í nógv ár.

### Betra um karmarnar

Spurdur, um hvørji tiltøk FSF ætlar at seta í verk til tess at fyribyrgja hesum trupulleika, vísir Óli Holm á, at FSF hevur gjørt eitt stórt arbeiði á hesum øki seinastu árini.

Eitt nú hava seinastu 7-8 árini verið hildin reglulig skeið fyri verandi dómarar, eins og ein føst útbúgvingarskipan hevur virkað í eini 6-7 ár.

Óli Holm vónar, at hetta eisini fer at vísa seg um nøkur ár, soleiðis at tað verður ein javnari streymur av dómarum. Í løtuni er støðan nevnliga tann, at aldursbýtið millum dómararnar er ógvuliga ójavnt, soleiðis at vit hava nakrar dómarar við nógvum royndum, meðan vit hava nakrar, sum hava lítlar royndir í bestu deilini. Síðani er eitt stórt glopp ímillum hesar, og hetta má sigast at vera ein óheppin støða.

Formaðurin í dómaranevndini vísir tó í sama viðfangi á, at uppgávan hjá FSF í hesum sambandi er at skapa nóg góðar karmar til dómararnar at virka undir. - Sjálv rekruteringin av komandi dómarum er ein uppgáva, sum feløgini eiga at taka sær av, sigur formaðurin.

### Týdningarmikið við felag

Við hesum meinar hann við, at tað ikki skal ella eigur at vera uppgávan hjá FSF at finna fram nýggj dómaraevni og eggja hesum til. – Verður tann ábyrgdin tikin frá feløgunum, kann hetta geva úrslit í eini líkasælu á økinum, soleiðis at feløgini als ikki gera nakað við málið.

Óli Holm vísir eisini á, at eitt nú í Noreg eru dómarar framhaldandi limir í ymsu fótbóltsfeløgunum, og eru teir tá aktivir í arbeiðinum hjá feløgunum at uppala nýggjar dómarar.

At dómarar framvegis eru knýttir at feløgum, merkir tó á ongan hátt, at FSF ikki vil hava nakað dómarafelag. Óli Holm sigur, at tað er av alstórum týdningi, at dómararnir hava eitt felag, sum kann tala teirra felags søk.

Sjálvur heldur hann, at dómarafelagið, hóast sera trongar karmar, hevur virkað væl, og heldur hann, at gott samstarv hevur verið millum FSF og felagið. Nakað sum kanska kann tykjast ilt at skilja, tá dómararnir í vár hóttu við verkfallið. Eitt verkfall, sum tó varð av ongum, tá tað kom til stykkis.



*Bæi Birgir Sondum og Oddmar Andreasen hava fyri fyrst lagt floytuna á hillina, og hetta hevur viðvirkað til akutta dómaratrotið*

***Savnsmynd***

### Harmur um missin

Ein avleiðing av hesum var, at Oddmar Andreasen fyri fyrst hevur lagt floytuna á hillina, og í summar gjørdi Birgir Sondum av, at hann ikki verður tøkur at døma dystir, tá sum eftir er av árinum.

Um hetta sigur Óli Holm, at teir sjálvsagt eru keddir um missin av tveimum somikið royndum dómarum, men hann vísur aftur, at FSF skal hava gjørt ov lítið, til tess at halda teimum til.

- Tá dómarar taka eina slíka avgerð, eru vit noyddir at taka hana til eftirtektar. Vit eru noyddir at virða teirra ynski um at fáa ein steðg í dømingini, men tað merkir ikki, at vit ikki harmast um støðuna, sigur Óli Holm at enda.

# Toyota-Cup á Argjum

*Stór summarkapping í fótbólti var fyriskipað á Argjum í døgunum 11.-13. august. Ætlanin er at fyriskipa slíka kapping á hvørjum ári*

Argja bóltfelag skipaði fyri stórari fótbóltskapping í Argjum, vikuskiftið 11. til 13. auguyst. Tilmeldað vóru 36 lið, og varð kappast á hálvum vølli. Pinkulingar leiktu tó á fjórðings vølli.

Byrjaði fríggjakvøldið, tá partur av innleiðandi dystunum vórðu leikti. Síðani varð hildið fram leygardagin, tá spælt varð frá morgni til myrkurs, og sunnumorgunin vórðu so seinastu dystirnir leiktir.

Leygardagin, tá flestu dystirnir vóru á skránni, regnaði nakað, men bæði frígga- og sunnudagin var turt. Sum skilst vóru allir luttakarar væl nøgdir við tiltakið, og hjá fyrireikarunum gekst eisini væl at avgreiða kappingina til ásettu tíðina.

Vinnandi liðini, sum síggjast á hesum síðum,, fingu heiðursmerki frá Toyota, sum eisini lat heiðursmerki til liðini, sum endaðu sum nr. tvey og trý.

Harumframt fingu vinnararnir eisini ognarsteyp, sum vórðu latin av Blaslev, Búðsetur, Eikini, Føroya Banka, Føroya Lívstrygging, Kemilux, Profa farvur, Sosialinum, Statoilstøðini á Argjum, Suðuroyar Sparikassa og Sveipi.

Vegna fyrireikararnar úr AB skulu vit takka teimum, sum tóku lut í kappingini, eins og ein heilsan verður borin stuðlunum.




*Kappingina hjá pinkum vann AB*






*Teir yngstu hjá HB vunnu pinkulingakappingina*




*10-12 ára gomlu VB genturnar fóru heim aftur við gullmerkjum*




*Smápiltakappingina vann VB*




*Tær úr HB vunnu kappingina hjá gentum 12-14 ár*




*Vinnari av piltum: AB*




*B71 vann kappingina hjá teimum 14-17 ára gomlu gentunum*




*Í smádreingjadeildini gjørdist B36 vinnari*




*Kvinnudeildina vann AB*